## Til Arktis eftir olju

Stendur tað til norska oljumálaráðharran, Terje Riis-Johansen, skulu norðmenn leita eftir olju og gassi undir havbotninum kring Jan Mayen. Í fyrsta umfari vil hann hava økið kannað. Ráðharrin sigur, at skal Noreg varðveita tær góðu inntøkurnar frá olju og gassi, noyðist landið at leita eftir møguleikum á nýggjum leiðum. Hóast umhvørvisfelagsskapir hava mælt frá, hevur stjórnin í Oslo samtykt at loyva olju - og gassleiting við Jan Mayen samsvarandi avtaluni, sum Noreg og Ísland gjørdu um Jan Mayen í 1981. Í 1993 gjørdi Altjóða Dómstólurin í Haag av, at leiðin millum Jan Mayen og Grønland skal býtast millum Noreg og Danmark eftir miðlinjuni.



## Revsing fyri at ganga í buksum

Stýrið í Norðurkorea vil ikki hoyra talan um, at landsins kvinnur ganga úti í buksum, og tær, sum eru so djarvar at gera ímóti stýrinum, kunnu fyrireika seg til at hart arbeiði í serligum arbeiðslegum. Tað sigur ein suðurkoreanskur mannarættindafelagsskapur. Frá loyniligum keldum í Norðurkorea hevur felagsskapurin frætt, at stýrið er farið undir eitt moralskt átak, sum millum annað umfatar eini boð um, at kvinnur skulu ganga í skjúrti, tá tær eru á almennum støðum og á gøtuni. Tær, sum gera ímóti boðunum, verða dømdar revsiarbeiði umframt eina vikuløn í bót, sigur felagsskapurin.

# Barnavinarligur miðbýur

**Í hesum døgum verður eitt spælipláss til børn gjørt í Eik-garðinum í miðbýnum. Hetta er liður í at gera miðbýin meira aktivan**

MIÐBÝURIN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Heðin Mortensen, borgarstjóri, og Bogi Andreasen, varaborgarstjóri, kanna arbeiðið við at gera nýtt barna- og spælioki í Eik-garðinum í miðbýnum*
*Mynd: Marjun Niclasen*

- Vit hava ásannað, at miðbýurin ikki hevur verið nóg innbjóðandi, og tí hava vit gjørt eina ætlan fyri alt økið, sigur Heðin Mortensen.

Ein liður í hesum var at keypa bygningin, har býarbókasavnið heldur til, og nú er enn eitt stig tikið á leiðini. Nú verður eitt spælipláss gjørt í Eik-garðinum, so hann fer at umfata annað og meiri enn bert eina standmynd.

- Vit byggja spælihús og gera brúgvar um allan garðin, eins og alt verður plantað av nýggjum. Eisini verða benkur settir upp, so foreldur í frið og náðum kunnu eygleiða børnini, meðan hesi spæla í nýggja spælistaðnum, sigur Heðin Mortensen.

Í hesum sambandi hevur kommunan gjørt avtalu við Eik Banka um nýggja spælistaðið, og borgarstjórin er ógvuliga fegin um, at hetta hevur latið seg gjørt.

- Við hesum verður miðbýurin munandi meiri innbjóðandi og aktiviteturin verður uttan iva munandi størri, tí hetta er eitt av teimum tiltøkunum, sum dregur fólk til sín, sigur Heðin Mortensen.

Nýggja barna- og spæliøkið fer eisini at gera tað møguligt at skipa fyri fleiri tiltøkum á mentanarøkinum, eins og tað verður munandi lættari at skipa fyri barnatiltøkum í miðbýnum.

Heðin Mortensen sigur, at ein partur av nýggja barna- og spæliøkinum verður liðugur til ólavsøku.

# Váttar rating hjá Føroya Banka

**Metingarstovnurin, Moody's, váttar, at Føroya Banki varðveitir sína rating, meðan sjey stórir danskir bankar eru í vanda fyri at verða niðurrataðir**

RATING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Føroya Banki er einasta privata fyritøka, sum er mett av viðurkenda metingarstovninum Moody's. Føroyar sum tjóð eru eisini komnar undir metingarnar hjá stovninum, og tað er nakað, sum hendir eftir umbøn frá tí, sum vil verða kredittmettur.

Í einum tíðindaskrivi frá Moody's í gjár váttaði metingarstovnurin sína kredittmeting av Føroya Banka. Váttanin av øllum ratings hjá bankanum var gjørd í sambandi við, at Moody's hevur valt at endurmeta ratings hjá flestu donsku fíggjarstovnunum við møguleika fyri lækkan næstu vikurnar. Einastu undantøkini eru Danske Bank og Føroya Banki, hvørs kredittmeting bleiv váttað longu nú.

Bankar, sum eru í vanda fyri at verða niðurgradaðir, eru Jyske Bank, Sydbank, Nordea Bank Danmark, Nykredit Bank, Spar Nord Bank, Amagerbanken og Ringkøbing Landbobank.

Eisini realkredittfeløgini BRF, Nykredit, DLR og Danmarks Skibskredit eru undir endurmeting.

### Lutfalsliga styrkt

Moody's greiðir frá, at ætlaðu broytingarnar av kredittmetingini av donsku stovnunum kemur í kjalarvørrinum av, at metingarstovnurin roknar við, at kredittgóðskan hjá hesum fíggjarstovnunum vil versna framyvir. Í hesum umhvørvinum staðfestir Moody's, »at bankarnir hvørs rating mest sannlíkt verður lækkað eru teir við eini lítlari eginogn í mun til útlánini«.

- Í hesum umhvørvinum við stórari óvissu hevur gott álit frá altjóða íleggjarum og metingarstovnum høga raðfesting í Føroya Banka. Tí er tað sera nøktandi, at Moody's viðurkennir okkara sterku fíggjarligu støðu og velur at varðveita okkara kredittmeting, meðan flestu aðrir bankar vera lækkaðir í metum. Úrslitið er, at hetta betrar um bankans lutfalsligu støðu hjá altjóða íleggjarum, sigur Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka, í stuttari viðmerking til tíðindini frá Moody's.

Hóast Føroya Banki sostatt ikki verður uppgradaður, verður støða bankans styrkt lutfalsliga.



*Janus Petersen heldur, at tað er sera nøktandi, at Moody's viðurkennir sterku fíggjarligu støðu Føroya Bankas og velur at varðveita bankans kredittmeting, meðan flestu aðrir bankar vera lækkaðir í metum*